# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Veðrið kann verða harðasta mótstøðan hjá Ukreina.*

*Igor Linnyk, journalistur í Kiev*

Kyndil-VÍF:

## Klassikari á Hálsi

**Fyrsti finaludysturin í manshondbólti verður á Hálsi sunnudagin, og her vera áskoðararnir vitni til enn ein klassikara, tá Kyndil tekur ímóti kappingarneytunum úr VÍF**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Kyndil hevur havt eitt fram úr endaspæl í Atlantic Airways kappingini hjá monnum. Tá liðini fóru undir endaspælið, lá Kyndil á fjórða plássi í bestu mansdeildini, og eftir fyrsta umfar var einki, sum bendi á, at Kyndil fór at koma í finaluna. Tá taptu teir nevniliga fyri hoyvíkingum, og tapið førdi við sær, at teir duttu niður á aftasta plássið í deildini. Kyndil gav tó ikki upp. Í næstu átta dystunum vunnu teir seks og spældu tveir javnar, og við avbera góða stimanum blivu teir klárir til finaluna undan síðsta leikumfari, tá teir taptu fyri VÍF í Vestmanna.



*Fyrsti finaludysturin í Atlantic Airways kappingini verður sunnudagin, tá ið Kyndil tekur ímóti VÍF*

Mótstøðuliðið hjá Kyndli í finaluni verður júst VÍF. VÍF var at kalla einaráðandi í grundspælinum, har teir m.a. megnaðu at vinna síðstu sjey dystirnar á rað. Tá blivu vestmenningarnir eisini róptir sum stórfavorittar at vinna meistaraheitið.

Í endaspælinum hevur gongdin tó ikki verið eins góð. Úrslitini hava verið heldur svingandi, og tá teir taptu ímóti Neistanum fyri tveimum vikum síðani, valdi VÍF at siga samstarvið við venjaranum, Dia Midjord, upp.

VÍF bleiv tó klárt til finaluna, har teir nú skulu møta Kyndli í høllini á Hálsi í fyrsta dystinum. Nýggjur maður við stýrisvølin í Vestmanna er ein gamal kenningur. Fyrrverandi VÍF- og landsliðsvenjarin, Lars Nedergaard, hevur nevniliga játtað seg at standa á odda fyri VÍF, tað ið eftir er av kappingini.

### Verjan skal koyra

VÍF hevur havt takið á Kyndli í landskappingini í ár, men seinast liðini møttust í høllini á Hálsi, var eingin ivi. Tá vann Kyndil nevniliga stórt. Hans Áki Dal Christainsen hjá Kyndli væntar tó ein javnan dyst hesuferð.

- Ja, eg vænti ein javnan og spennandi dyst, sum vit heilt víst ætla okkum at vinna. Tað hevur stóran týdning, at vit fáa verjuna at koyra, tí so skal alt hitt nokk koma.

Kyndil hevur annars spælt sera skjótan hondbólt í endaspælinum, og hetta hevur víst seg at rigga væl. Hans Áki sigur eisini, at hetta skulu teir halda fast um.

- Vit mugu fáa okkara skjóta spæl at koyra í dystinum. Hetta hevur riggað væl hjá okkum í seinastuni, so tað mugu vit halda fast um. Tað hevur eisini stóran týdning, at vit skora uppá okkara møguleikar. Hasin bólturin skal bara í málið, sigur Hans Áki, sum eisini metir, at heimadysturin helst skal vinnast.

Annars stendur hampiliga væl til við fólki hjá Kyndli til dystin sunnudagin. Einasta ivamálið er Hjalti M. Jacobsen, sum hevur ein skaða í fótliðinum.

### Eingin Eli

Ein av dyggastu stuðlunum á VÍF-liðnum, málmaðurin Eli Müller, verður ikki við í fyrsta finaludystinum sunnudagin, tí hann fekk reyða kortið í síðsta dystinum í endaspælinum. Eli hevur staðið sera væl í ár, men Regin Joensen hjá VÍF heldur, at tað nokk skal fara at ganga kortini.

- Vit hava ein annan góðan málmann í Bárði Nielsen, og hann fer heilt víst at standa ein góðan dyst ímóti Kyndli. Tað hevur stóran týdning, at verjan eisini hjálpir málmanninum í einum slíkum dysti.

Regin heldur annars sum heild, at verjan verður avgerandi í einum slíkum dysti.

- Vit mugu fyrst og fremst hava eina harða og ágangandi verju, og so skulu vit eisini steðga Janus Einar, sum er ein sera týdningarmikil spælari hjá teimum. Harafturat skulu vit eisini fáa okkara skjótálop at rigga, so fer tað nokk at ganga.

VB-Stjørnan:

## VB skal helst vinna í Vági

**Fyrsta finalan í Sunset kappingini verður í Vági sunnudagin, har VB tekur ímóti Stjørnuni. Sjálvt um Stjørnan má metast at vera greiður favorittur, so hevur VB víst fyrr í ár, at tær saktans kunnu steðga Stjørnuni í Vági**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Stjørnan hevur verið mest sum einaráðandi í hesum kappingarárinum í kvinnuhondbólti. Í endaspælinum hava tær vunnið allar sínar dystir, tær vunnu finaluna í Coca Cola-kappingini, og so vunnu tær eisini sannførandi í báðum hálvfinalunum í Sunset kappingini. Tí mugu tær eisini metast at vera stórfavorittar undan finaludystunum ímóti VB.

Hjá VB hevur ikki gingið so væl í ár. Tær hava ligið aftanfyri Stjørnuna og Neistan mest sum allan vegin, men úrslitini eru tó blivin betri og betri út á árið. Sjálvt um tær ongan dyst hava vunnið á Neistanum í ár, so megnaðu tær at spæla seg í finaluna við tveimum javnleikum, og nú eru tær klárar at møta Stjørnuni í finaluni.

### Berjast fyri lívinum

VB hevur fingið góð úrslit ímóti Stjørnuni í Vági í ár. Tær vunnu tryggan sigur í grundspælinum, meðan dysturin í endaspælinum endaði við einum eitt máls tapi. Rannvá Johannesen hjá VB sigur, at hesin dysturin skal vinnast.

- Vit ætla okkum at vinna dystin sunnudagin. Tað verður sjálvandi ikki lætt, men vit mugu bara berjast fyri lívinum, og so hevur tað stóran týdning, at allar vera klárar til dystin.

VB hevur alt fólki tókt til dystin sunnudagin, og Gurið Mortensen kemur eisini heim til dystin úr Danmark. Rannvá dylur ikki fyri, at Gurið er ein týðandi leikari.

- Gurið kann so nógv sjálv. Hon tekur ábyrgd, bæði í verju og í álopi, og tí hevur hon nógv at siga í einum slíkum dysti.

### - Føla okkum ikki sum favorittar

Síðstu dystirnar hevur Stjørnan spælt uttan helst mest týðandi leikaran, Alinu Olaru. Hon verður tó tøk til dystin ímóti VB, sigur Una Olsen.

- Allar eru klára til dystin í Vági. Vit hava valt at spara Alinu síðstu dystirnar, tí hon hevur havt onkran smávegis skaða, men hon er heilt klár til dystin.

Una væntar annars ein spennandi dyst í Vági, og hon følir ikki, at Stjørnan er favorittur undan dystinum.

- Vit føla okkum ikki sum favorittar. Dystirnir í Vági plaga at vera javnir og spennandi, og tað hevur stóran týdning, at vit blíva við at kempa. Vit mugu gera alt fyri at vinna henda dystin, tí vinna vit í Vági, so sær gott út undan hinum dystunum.



*VB hevur fingið góð úrslit ímóti Stjørnuni á hiemavølli í ár, so ikki er óhugsandi, at tær enn einaferð megna at steðga favorittunum úr Klaksvík*